













# Dygdarhús í býarumhvørvi við bygdadámi

Nær miðbýnum í Havn finnur tú hesa frálíku ogn, ið tó liggur so mikið burturfrá, at tú so at siga hevur óspiltu náttúruna í garðinum.

**Fyrsta fatanin – uttan og innan**
Uttan um húsið er grivið upp, og tað tykist nakað rokaligt, tí nakrar broytingar eru við at verða framdar. Lat teg bara ikki styggja burtur, tí her er talan um bæði góðsku og dygd. Talan er um eini sera væl bygd Norðseturhús, har ið einki er spart, tá talan er um handverk og tilfar, ið kann økja trivnaðin og nøgdsemið. Har eru vakrar og sterkar hurðar og sprossavindeygu úr mahogni við orkuglasi, plankagólv úr ask, ventilatiónsskipan o.s.fr.

**Ljós og luft – inni og úti**
Húsini standa innast í Perskonugøtu, so stutt er oman í býin og til handlar, dagstovnar, skúlar o.a. nærhendis. Hinvegin liggur ognin við friðað øki, so tú fært óspiltu náttúruna sera nær, og tú kanst ganga millum býlingarnar eftir hugnaligum gøtum. Nógv vindeygu eru í húsinum, so allastaðni, har ið frítt er fyri, kanst tú standa inni og njóta vakra útsýni yvir landslagið og yvir býin.

**Innrætting, stílur og snið**
Tá tú kemur til úthurðina kanst tú velja at fara beint inn í hjallin, víðari inn í grovkøkin og harfrá heilt inn í køkin / alrúmi. Hinvegin kunnu gestirnir fara gjøgnum høvuðsdyrnar inn í durin, víðari inn í gongina og inn í restina av húsinum. Baðirúm er bæði í erva og í neðra, og frálíku trappurnar bera teg lættliga upp og niður í húsinum. Stóra alrúmið og stóra stovan geva gott pláss og trivna til húsfólk og til gestir, og hyggur tú út, er ljós og luft og nakað av útsýni. Fert tú upp í ovastu hædd, er hugni og tryggleiki á stóra kvistinum og í stóru hugnaligu kømurunum við skrálofti. Baðirúmi í erva hevur bæði gosbað og brúsu. Nóg mikið av plássi er til stóru familjuna ella til ta lítlu við nógvum virksemi. Her kunnu allir aldrar vera, tí niðast er hugnalig og snotilig íbúð í gerð, ið stóru børnini kunnu nýta, ella tú kanst fáa ískoyti til húsaleiguna við at leiga út.

**Kjallarin**
Trappa og niðurgongd er úr miðhæddini til niðastu hædd, og inngongdina aftanfyri kann húsfólkið nýta. Har er snøgt fýrrúm og kjallarúm, ið kann nýtast til mangt og hvat, og til at goyma tað ónýtiliga í. Inngongdin frammanfyri er til snøggu íbúðina, ið er í gerð, og hon er eins væl bygd, sum restin og væl vard við gipsplátum innan móti eldi og ljóði.

**FAKTA**
Húsini eru í 3 hæddum – niðasta á 95 fermetrar, miðhæddin á 100 og ovasta á 85 fermetrar – í alt 280 fermetrar. Grundøkið er 437 fermetrar. Byggiár: 2001. Í miðhæddini er inngongd, hjallur, grovkøkur / vaskirúm, køkur / alrúm / borðsstova, durur, gongd, baðirúm, borðsstova / stova, trappugongd upp/niður. Í ovastu hædd er trappugongd / alrúm / stova, stórt hjúnarrúm, 2 kømur og baðirúm við gosbað og brúsu. Í niðastu hædd inngongd, fýrrúm / kjallararúm og sjálvstøðug íbúð í gerð. Har er inngongd, køkur, stova, gongd, baðirúm og kamar. Húsini standa í veðurgóðum, hugnaligum og náttúruvøkrum umhvørvi nær miðbýnum. Friðað øki er omanfyri og stutt er til dagstovnar, skúlar, Handilsskúlan, Sjúkrahúsið, handlar o.m.a. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst. Meira fæst at vita hjá Inni – tel. 354200 ella á heimasíðuni www.inni.fo

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni